# Umsókn um barsilspening: Arbeiðsgevari

## Høvuðstreytin fyri at fáa rætt til barsilspening er, at tú sum arbeiðsgevari:

1. Rindar A-inntøku í sambandi við barsilsfarloyvi

## Skjøl, sum skulu latast inn saman við umsóknarblaðnum:

1. Læknaváttan um nær mett verður, at barnið verður føtt, tá søkt verður um barsilspening í upp til 4 vikur áðrenn barnsburð ella
2. Læknaváttan um, at tað fyri fostur og/ella mammu stendst heilsuvandi av at vera í starvinum, tá søkt verður um barsilspening í upp til 8 vikur áðrenn barnsburð ella
3. Fráboðan um barnsburð /ættleiðingarloyvi, tá søkt verður um barsilspening fyri tíðarskeiðið eftir barnsburð

Sbrt. § 15 í Løgtingslóg um barsilsskipan kanst tú sum arbeiðsgevari, í tann mun tú rindar A-inntøku í sambandi við barsilsfarloyvi, fáa rindað barsilspening, sum løntakarin annars hevði havt rætt til sbrt. §§ 12 og 13, um løntakaranum ikki varð rindað A-inntøku frá tær sum arbeiðsgevara. Barsilsskipanin fær hesar upplýsingar til vega beinleiðis frá Taks. Útlendsk inntøka skal tó skjalprógvast við lønarseðlum.

Serligar reglur eru fyri landsstovnar sbrt. § 15a.

Barsilspeningurin kann ongantíð verða meiri enn 25.000 kr. um mánaðin.
Um fleiri arbeiðsgevarar eru, ið rinda løn til sama persón, sum er í barsilsfarloyvi, og røkkur peningurin ikki til fult endurgjald, verður mánaðarliga endurgjaldið til hvønn teirra ásett lutfalsliga.

Umsókn um barsilspening skal latast Barsilsskipanini innan 6 mánaðir eftir barnsburð ella, í sambandi við ættleiðing, eftir at tey hava fingið barnið. Er umsóknin ikki latin inn innan hesa freist, fellur rætturin til barsilspening burtur.

Um tú gevur skeivar ella misvísandi upplýsingar, verða upphæddir kravdar afturgoldnar, og tú kanst verða revsað/ur við sekt ella hefti. Upplýsingarnar, latnar á umsóknarblaðnum, kunnu í sambandi við eftirlit kannast við heimild í § 21 í Ll. um barsilsskipan frá 3. apríl 2001.

Umsóknarblaðið skal fyllast út nágreiniliga. Um tú hevur nakrar spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Barsilsskipanina.

Á heimasíðuni hjá Barsilsskipanini, www.barsil.fo, finnur tú nærri kunning í samband við barsilsfarloyvi, m.a. lógir og kunngerðir

**Vinarliga fyll umsóknarblaðið út við spjaldrastavum.**

## 1. Umsøkjari

| | |
|---|---|
| Navn: | V-tal: |
| Gøta og nr.: | Telefon: |
| Postnr. og bygd/býur: | Postsmoga: |
| Møguligur ábyrgdarpersonur: | T-postur: |
| Er talan um landsstovn? (Sí "Ískoyti til Landsstovnar")<br>***Um*** *ja skal umframt umsóknin "Ískoyti til Landsstovnar" eisini útfyllast* | JA ☐ NEI ☐ |

Skal sendast til: TAKS, postrúm 2151, FO-110 Tórshavn, faks á 35 26 01 ella við teldupost til taks@taks.fo

# Barsilsskipanin

## 2. Løntakari, ið fer í barsilsfarloyvi

| | |
|---|---|
| Navn: | P-tal: |
| Gøta og nr.: | Telefon: |
| Postnr. og bygd/býur: | Postsmoga: |
| T-postur: | |

## 3. Tíðarskeið, ið søkt verður um barsilspening

| Frá<br>*(dg. mð. ár)* | Til og við<br>*(dg. mð. ár)* |
|---|---|
| | |
| | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 30 vikur eftir føðing ☐<br>*(Um pápin tekur 4 vikur)* | 32 vikur eftir føðing ☐<br>*(Um pápin letur 2 vikur)* | 34 vikur eftir føðing ☐<br>*(Einlig/ættleiðing)* | 38 vikur eftir móttøku ☐<br>*(Um pápin letur 4 vikur)** |

** Bert í samb. við ættleiðing.*

## 4. Lønarviðurskifti

Hevur løntakarin sambært lóg og sáttmála rætt til løn frá tær, meðan viðkomandi er í barsilsfarloyvi? JA ☐ NEI ☐

**Um ja**:

Full A-inntøka um mánaðin:
*(uttan eftirløn, frítíðarløn ella frítíðarískoyti):* ______________ Rindi 1/2 løn ☐

Tíðarskeið *(frá - til og við)*: ______________

**Arbeiðsmarknaðargjøld um mánaðin:**

| | |
|---|---|
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (1,75%) | Kr. ______________ |
| Barsilsskipanina (0,62%) | Kr. ______________ |
| Vinnusjúkugrunnurin (0,10%) | Kr. ______________ |
| Arbeiðsloysisskipanina (1,25%) | Kr. ______________ |

*(Um tygum ikki rinda løntakaranum løn í farloyvistíðarskeiðinum, er tað løntakarin, ið skal senda Barsilsskipanini umsókn um barsilspening)*

Skal sendast til: TAKS, postrúm 2151, FO-110 Tórshavn, faks á 35 26 01 ella við teldupost til taks@taks.fo

## 5. Partvís í arbeiði *(heldur áfram at arbeiða í farloyvistíðarskeiðinum – sí §8 a og § 12 í lógini)*

Er løntakarin partvís í arbeiði hjá tær í farloyvistíðarskeiðinum? JA ☐ NEI ☐

**Um ja:**
Hvussu nógv arbeiðir hann/hon (%-tíð av fullari løn): ____________________

Tíðarskeið *(frá - til og við)*: ____________________

## 6. Verið í starvi hjá tykkum styttri enn eitt ár

Hevur løntakarin verið í starv hjá tygum styttri enn eitt ár **beint undan barsilsfarloyvinum**?
*(sí vegleiðingina)* JA ☐ NEI ☐

**Um ja:**
Nær byrjaði løntakarin at arbeiða? *(dg. mð. ár)* ____________________

Hevur løntakarin rætt til barsilspening úr øðrum landi? JA ☐ NEI ☐

## 7. Hvagar skal barsilspeningurin flytast?

Navn á peningastovni: ____________________

Kontonummar: ☐☐☐☐ – ☐☐☐☐☐☐☐

Ynskir tú at fáa peningin útgoldnan: Mánaðarliga ☐ Alt í einum, tá samlaða farloyvið er av ☐

Annað/kontostrongur: ____________________

## 8. Viðmerkingar

| |
|---|
| |
| |
| |

## 9. Váttan og undirskrift arbeiðsgevarans

Undirritaða/undirritaði bindi meg til at geva Barsilsskipanini boð um allar broytingar í viðurskiftum viðvíkjandi omanfyri nevndu spurningum og annars um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri Barsilsskipanina, herundir barsilspeningin.

Eg vátti undir trúnaðartreytum at hava lisið leiðbeiningina á síðu 1 og hjáløgdu vegleiðingar og at givnu upplýsingarnar eru sannar.

____________________ ____________________
Dagfesting Undirskrift

*(Víst verður til Løgtingslóg um barsilsskipan frá 3. apríl 2001 við seinni broytingum og Kunngerð um umsiting av Barsilsskipan frá 31. mai 2001, sum eru at finna á www.barsil.fo)*

## 10. Løntakaran at fylla út

Hava tygum tilknýti til fleiri arbeiðsgevarar í tíðarskeiðinum, tygum eru í barsil? JA ☐ NEI ☐

**Um ja**, hvørjar? ____________________

Eru tygum einsamøll/einsamallur við barninum? JA ☐ NEI ☐
*(sí vegleiðingina, pkt. 10)*

Eg vátti, at upplýsingarnar í teigunum: 2 Løntakarin, ið fer í barsilsfarloyvi, 3 Tíðarskeið, søkt verður um barsilspening, 4 Lønarviðurskifti, 5 Partvís í arbeiði og 6 Verið í starvi hjá tær styttri enn eitt ár, eru rættar. Somuleiðis vátti eg, at eg sambært § 8 a eri um barnið í farloyvistiðarskeiðnum, ímeðan eg fái barsilspening.

____________________ ____________________
Dagfesting Stempul og undirskrift

## 11. Váttan frá pápanum *(verður bert útfylt, **um** pápin velur at lata mammuni part av sínum farloyvi)*

Eg vátti, at eg lati mammuni allar ella ein part av vikunum av farloyvinum, ið eru avsettar til mín sum pápa.

____________________ ____________________
Dagfesting Undirskrift

## 12. Váttan frá móðir at barninum *(verður bert útfylt, **um** løntakarin, ið arbeiðsgevarin søkir um, er faðir at barninum)*

Eg vátti, at pápin at barninum er umsøkjarin.

____________________ ____________________
Føðingardagur og P-tal Navn

____________________ ____________________
Dagfesting Undirskrift

Um pápin søkir um barsilspening **í meira enn 4 vikur eftir 14. viku** eftir barnsburð, sigi eg mær rættin til barsilspening frá og vátti somuleiðis, at eg ikki eri frá arbeiði við løn í hesum tíðarskeiðinum.

____________________ ____________________
Dagfesting Undirskrift

# V e g l e i ð i n g

## 1. NAVN OG BÚSTAÐUR

Sambært kunngerðini um umsiting av Barsilsskipan er ásett, at arbeiðsgevarin skal upplýsa V-tal, navn á virkinum, møguligan ábyrgdarpersón og bústað á oyðublaðnum.

## 2. LØNTAKARIN, IÐ FER Í BARSILSFARLOYVI

Umframt navn og bústað v.m. skrivar tú her P-talið hjá løntakaranum. Hetta við heimild í Løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.

## 3. TÍÐARSKEIÐ, SØKT VERÐUR UM BARSILSPENING

Sbrt. § 9 í lógini hevur løntakarin rætt til barsilspening, tá mett er, at 4 vikur eru eftir til barnsburð og upp til 20/38 vikur eftir til barnsburð/móttøkudag.

Um løntakarin við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum, hevur løntakarin rætt til barsilspening í fyrsta lagi frá tí degi, at mett verður, at 8 vikur eru eftir til barnsburð.

Um løntakarin er faðir at barninum, kann arbeiðsgevarin søkja um barsilsfarloyvi í upp til 16/20 vikur eftir 14. viku eftir barnsburð. Rætturin til barsilsfarloyvi kann bert verða nýttur av einum av foreldrunum í senn. Faðirin hevur tó **samstundis** sum mamman rætt til barsilspening upp til 4 vikur eftir barnsburð innan tær fyrstu 34 vikurnar eftir barnsburð.

Í tíðarskeiðinum skal fyrsti og seinasti farloyvisdagur skrivast. Um tygum søkja til og við 30/38 vikur eftir barnsburð /ættleiðing er nóg mikið at seta kross í kassan høgrumegin.

**DØMI:**

| Frá | Til |
|---|---|
| 03.11.2010 | |
| | |

| 30 vikur ☒ | 32 vikur ☐ | 34 vikur ☐ | 38 vikur |
|---|---|---|---|

## 4. LØNARVIÐURSKIFTI

Um tú sum arbeiðsgevari rindar A-inntøku í farloyvistíðarskeiðinum, skrivar tú her lønina um mánaðin. Umframt lønina skalt tú eisini her skriva arbeiðsmarknaðargjøld (Gjald til Arbeiðsloysisskipanina (1,25 %), gjald til Barsilsskipanina (0,62 %) og gjald til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (1,75 %).

Barsilsskipanin rindar sbrt. § 15 í lógini ikki fyri eftirløn.

Um løntakarin ikki fær løn sambært lóg og sáttmála í farloyvistíðini, er tað løntakarin, ið skal senda Barsilsskipanini eina umsókn um barsilspening.

Um lønin hjá løntakaranum broytist í farloyvistíðarskeiðinum, skal arbeiðsgevarin, í teiginum **Viðmerkingar**, svara øllum spurningum í **Lønarviðurskifti**.

## 5. PARTVÍS Í ARBEIÐI

Ynskir løntakarin at røkja eitt starv niðursetta tíð t.d. ein part av tíðarskeiðinum, er hetta møguligt sbrt. § 12 í lógini.

Um løntakarin t.d. arbeiðir vanligt 40 tímar um vikuna, og í barsilstíðarskeiðinum framhaldandi arbeiðir 10 tímar um vikuna, so skal her skrivast, at løntakarin arbeiðir 25 % av fullari tíð. Inntøkugrundarlagið verður lækkað samsvarandi hesum.

Í tíðarskeiðinum skulu fyrsti og seinasti farloyvisdagarnir skrivast.

Skal sendast til: TAKS, postrúm 2151, FO-110 Tórshavn, faks á 35 26 01 ella við teldupost til taks@taks.fo

## 6. VERIÐ Í STARVI HJÁ TÆR STYTTRI ENN 1 ÁR
Nýsettur í starv er tann, sum hevur verið á arbeiðsmarknaðinum í minni enn eitt ár, beint undan fráveruni vegna barnsburð, sbrt. § 12, stk. 2 í lógini.

## 7. HVAGAR SKAL BARSILSPENINGURIN FLYTAST?
Barsilspeningurin verður fluttur beinleiðis á ta kontu, upplýst verður her.

## 8. VIÐMERKINGAR
Eru nakrar viðmerkingar, skulu tær skrivast her.

## 9. VÁTTAN OG UNDIRSKRIFT UMSØKJARANS
Um tú gevur skeivar ella misvísandi upplýsingar, verða upphæddir kravdar afturgoldnar, og tú kanst verða revsað/ur við sekt ella hefti, sbrt. § 26 í lógini.
Sambært § 21 í lógini og § 6 í kunngerð um umsiting av Barsilsskipan kann Barsilsskipanin útvega sær allar upplýsingar frá TAKS, Landsfólkayvirlitinum og Almannastovuni til nýtslu í sambandi við útrokning og eftirlit við útgjaldsupphæddum.

## 10. TIL LØNTAKARAN AT ÚTFYLLA
Um so er, at tú sum løntakari hevur tilknýti til fleiri arbeiðsgevarar, verður tú her biðin um at upplýsa hvørjar. Hetta fyri at sleppa undan skeivleikum í útgjaldinum.

Er útrokningargrundarlagið størri enn lønin og gjøldini, arbeiðsgevarin fær endurgoldið, kanst tú søkja um at fáa munin útgoldnan. Hevur tú nakrar spurningar hesum viðvíkjandi, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Barsilsskipanina.

Við einsamøll/einsamallur eftir § 9, stk. 5 skal skiljast, at tú ert ógift/ur, skild/ur ella separerað/ur. Faktiskt samlívsslit kann vera javnsett við seperatión. Tú skal eisini vera einsamøll/einsamallur um umsorganina fyri barninum og lúka treytina um ikki at liva saman við hinum av foreldrunum at barninum, ella einum, sum tú hevur verið giftur við. Og tú kann ikki fáa stuðul, um tú hevur ein sambúgva.

## 11. VÁTTAN FRÁ PÁPANUM
Sambært § 9, stk. 6 kunnu foreldrini avtala, at mamman skal hava upp til 2 vikur av teimum 4 vikunum, sum serliga eru avsettar til pápan.

## 12. VÁTTAN FRÁ MÓÐIR AT BARNINUM
Hetta skal útfyllast, um søkt verður um barsilspening vegna faðirin at barninum.

## Set teg í samband við Barsilsskipanina:

Mánadag – Fríggjadag: kl. 9:00 – 15:00

Telefon 35 26 00 ella við telduposti til taks@taks.fo